# Uttanríkis- og vinnumálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 25. januar 2024 |
| Mál nr.: | 23/25395 |
| Málsviðgjørt: | jd |
| Ummælistíð: | 25. januar-22. februar 2024 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**burðardygga ferðavinnu**
**(Ferðavinnulógin)**

*Endamál*

**§ 1.** Ferðavinna skal í øllum lutum skipast á burðardyggum grundarlagi til tess at tryggja fólkaræði, frælsi, trivnað, inntøkur og vinnumøguleikar hjá fólkinum kring landið við at
1) verja náttúru, tilfeingi og siðvenju,
2) styrkja staðbundin samfeløg, mentan og mentanararv,
3) styrkja samstarv millum ferðavinnu og aðrar vinnur, og við at
4) kunna um, hvussu farast skal fram í náttúruni, og hvussu ferðavinnan er skipað.
*Stk. 2.* Reglur, fyriskipanir, avtalur o.a., framt eftir hesi løgtingslóg, skulu miða eftir at røkka hesum málum.

*Allýsingar*

**§ 2.** Í hesi løgtingslógini skulu hesi hugtøkini skiljast soleiðis:
1) Bygdin: Heimafólkið, t.e. fólkið, sum býr á staðnum.
2) *Handilslig ferðavinna*: Skipaður túrur, har luttakarar gjalda fyri tiltakið. Fyriskipari eftir 1. pkt. kann vera persónur, felag o.tíl.
3) Innangarðs: Bøur og annað lendi innan fyri markið millum bø og haga, sum natúrliga verður fatað sum innangarðs, umframt annað velt lendi.
4) Uttangarðs: Óvelt lendi, sum ikki er fevnt av hugtakinum innangarðs, sum tað er lýst í nr. 3.
5) Strond: Rondin, sum myndar markið millum land og sjógv.
6) Eigari: Tann, sum eigur óðalsjørð.
7) Brúkari: Festari ella annar, sum uttan at vera eigari hevur jørð um hendi.
*Stk. 2.* Valdar í ítøkiligum førum ósemja um, hvussu allýsingarnar eftir stk. 1 skulu skiljast, tekur landsstýrismaðurin avgerð hesum viðvíkjandi.

**§ 3**. Við teimum avmarkingum og skyldum, sum eru ásettar í hesi

løgtingslóg, í reglum, givnar við heimild í hesi løgtingslóg ella í øðrum løgtingslógum og fyriskipanum, er einum og hvørjum frítt at ferðast uttangarðs og fram við strondini.

*Atburður*

**§ 4**. Øll, sum ferðast ella uppihalda sær uttangarðs, skulu hava fyrilit og fara væl um, so at tey ikki eru eigara, brúkara, fenaði, náttúru, mentanararvi ella øðrum at skaða ella til ampa.
*Stk. 2.* Loyvt er at brúka bát á vøtnum og í stutta tíð at draga smábát upp á strondina og brúka bátabrúgv og tílíkt, um hetta ikki er eigara ella brúkara til órímiligan ampa.
*Stk. 3.* Tað er bannað at taka gróður, egg, steinar og grót við sær, tá ið ferðast verður uttangarðs.
*Stk. 4.* Ikki er loyvt at hava hund við sær uttangarðs uttan í sambandi við landbúnaðarvirksemi.
*Stk. 5.* Eigari ella brúkari hevur rætt at vísa burtur fólki, sum ber seg fyrilitarleyst at ella er ognini at skaða ella til ampa.

**§ 5**. Uttan mun til ásetingina í § 3 kann handilslig ferðavinna bara útinnast í samráð við eigara ella brúkara.
*Stk. 2.* Ásetingin í stk. 1 gevur ikki eigara ella brúkara heimild at nokta fyri virksemi eftir stk. 1, sbr. tó § 12, stk. 3, men eigari ella brúkari kann krevja, at standardavtala eftir stk. 3 er gjørd frammanundan.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ger standardavtalu, sum er galdandi fyri virksemi eftir stk. 1.

*Ferðavinnuætlan*

**§ 6**. Allar kommunur skulu, saman við serstøku ella staðbundnu nevndini, sbr. § 7, og í samráð við eigara ella brúkara, gera eina ferðavinnuætlan, har ferðavinnuvirksemið í kommununi verður greinað, eins og gerast skal ein ætlan fyri, hvussu ferðavinnan á staðnum verður ment og fyriskipað á skynsamasta hátt samsvarandi endamáli løgtingslógarinnar. Ferðavinnuætlanin skal røkka út á kommunumark.
*Stk. 2.* Ferðavinnuætlanin skal í minsta lagi fevna um hesi viðurskifti:
1) Lýsing av almennum farleiðum, undir hesum bygdagøtur og aðrar gøtur, og av økjum, sum eru opin fyri ferðafólki,
2) eina lýsing av gøtum, sum verða gjørdar ella kunnu gerast til ferðafólk, sbr. eisini § 3,
3) eina lýsing av farleiðum og økjum, sum av trygdarávum ella verndarávum eiga at vera stongd fyri almennari ferðslu,
4) eina torleika- og váðameting av gøtunum, nevndar í nr. 1-2, sum staðfestir, hvar neyðugt er at hava ferðaleiðara, undir hesum eisini staðkendan ferðaleiðara, sbr. stk. 4.
5) um neyðugt er at avmarka tal av ferðafólki á ávísum leiðum og plássum, og
6) onnur viðkomandi viðurskifti í økinum, sum hon fevnir um, t.d. hentleikar hjá ferðafólki, neyðug átøk o.tíl.
*Stk. 3.* Ferðavinnuætlanin, sum skal góðkennast av landsstýrismanninum, skal vera liðug í seinasta lagi 1. juni 2025.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð nærri krøv til ferðaleiðarar, sum eru kravdir á ávísum støðum.

*Serstøk nevnd hjá heimafólki*

**§ 7**. Til at røkka málinum í § 6 og fyri at tryggja, at fyrilit verður havt fyri bygdini og heimafólkinum, skal kommunan seta eina serstaka nevnd við í mesta lagi sjey limum, sum skal geva kommununi ráð um, hvussu ferðavinnan eigur at verða skipað og útint á staðnum, og sum skal umsita peningin, ið kemur inn til bygdina frá náttúrugjaldinum eftir § 14.
*Stk. 2.* Í staðin fyri at seta serstaka nevnd eftir stk. 1 kann kommunan velja at leggja uppgávuna til ta staðbundnu nevndina, sbr. § 37 í løgtingslóg um kommunustýri.

*Farleiðir*

**§ 8**. Kommunan skal í samráð við eigara og brúkara, viðkomandi myndugleikar og stovnar merkja upp farleiðir og gera nýggjar farleiðir til tess at skipa ferðsluna uttangarðs.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta nærri reglur fyri, hvussu farast skal fram, tá ið farleiðir verða gjørdar.
*Stk. 3.* Kommunurnar hava ábyrgd av at halda tær gomlu bygdagøturnar.

*Skilhaldsreglur*

**§ 9.** Til at skipa gongdina í økjum, har ið nógv fólk ferðast, kann kommunan í samráð við eigara ella brúkara áseta skilhaldsreglur, sum øll, sum ferðast í økinum, skulu fylgja. Skilhaldsreglurnar kunnu m.a. hava til endamáls at tryggja frið, skil og reinføri, verja náttúru og mentanararv og tryggja, at gongdin ikki darvar landbúnaðin í órímiligan mun. Skilhaldsreglurnar skulu ikki avmarka rættin at ferðast meira enn neyðugt.
*Stk. 2.* Brot á skilhaldsreglur, givnar við heimild í stk. 1, kann verða revsað við sekt.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin skal góðkenna skilhaldsreglurnar og lýsa tær í kunngerð.

*Yvirtøka*

**§ 10.** Røkka skilhaldsreglur eftir § 9 ikki til at tryggja, at ávíst øki kann brúkast til tað endamál, sum tað varð brúkt til frammanundan, kann eigarin krevja, at landið yvirtekur økið móti fullum gjaldi.
*Stk. 2.* Sorinskrivarin útnevnir tvey metingarfólk við viðkomandi fakligum førleikum at taka støðu til, um treytirnar fyri yvirtøku eru loknar, og at áseta støddina á gjaldinum.

*Trygd*

**§ 11.** Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta reglur um, at tað í økjum, har serliga vandamikið er at ferðast, bara skal vera loyvt at ferðast við staðkendum fólki.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta, at serliga vandamikil øki av trygdarávum skulu vera heilt ella partvíst stongd fyri ferðslu ávísa tíð á árinum ella samdøgrinum.

*Ólógligar forðingar o.tíl.*

**§ 12.** Ikki er loyvt eigara ella brúkara við gjaldsportri, stongsli ella á annan hátt at forða fyri lógligari atgongd ella gera tað trupult hjá fólki at útinna síni rættindi eftir hesi løgtingslógini.
*Stk. 2.* Eigari ella brúkari kann ikki uttan serstaka heimild við skelti ella á annan hátt kunngera forboð fyri lógligari ferðslu og uppihaldi.
*Stk. 3.* Eigari ella brúkari kann, hóast ásetingarnar í stk. 1-2, avmarka ferðslu og uppihald, sum órógva serligt landbúnaðarvirksemi ella veiðu, t.d. fjallgongu og haruveiðu. Avmarking eftir 1. pkt. skal vera so avmarkað sum gjørligt.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð nærri reglur um, hvussu slíkar avmarkingar verða almannakunngjørdar.

*Náttúrugjald*

**§ 13**. Øll ferðafólk, 16 ár og eldri, sum koma til Føroya, skulu rinda eitt náttúrugjald.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetur upphæddina á náttúrugjaldinum í kunngerð.
*Stk. 3.* Gjaldið verður kravt inn saman við ferðagjaldinum eftir løgtingslóg um ferðagjald.

**§ 14**. Inntøkan frá náttúrugjaldinum verður býtt við eini helvt til kommunurnar, einum fjórðingi til bygdina og einum fjórðingi til jarðareigarar og jarðarbrúkarar.
*Stk. 2.* Partur kommununnar av náttúrugjaldinum er markaður til at gera og halda viðlíka gøtur í haganum, undir hesum eisini bygdagøtur, umframt til onnur átøk, sum skipa ferðavinnuna í einstøku bygdunum í kommununi.
*Stk. 3.* Partur bygda av náttúrugjaldinum verður latin serstøku nevndini eftir § 7, stk. 1, at umsita til átøk og trivnað á staðnum.
*Stk. 4.* Partur eigara og brúkara verður goldin pørtunum uttan treytir.
*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð nærri reglur um, hvussu

inntøkan verður býtt millum partarnar, nevndir í stk. 1-3.

*Boð*

**§ 15.** Landsstýrismaðurin kann við hóskandi freist áleggja tí, sum hevur ábyrgdina, at fáa aftur í rættlag ella steðga viðurskiftum, sum ikki eru í samsvari við reglur í ella við heimild í hesi løgtingslóg.
*Stk. 2.* Verða boð eftir stk. 1 ikki aktað, kann landsstýrismaðurin bera so í bandi, at tað, sum álagt er, verður framt fyri eigarans ella brúkarans rokning. Kravið kann krevjast inn við panting.

*Revsing*

**§ 16.** Er ikki hægri revsing ásett í aðrari lóggávu, verður við sekt revsaður tann, sum brýtur ásetingarnar í § 4, stk. 1 og 3, og § 12, stk. 1-2, ella ikki aktar boð eftir § 15, stk. 1.
*Stk. 2.* Í reglum, givnar við heimild í hesi løgtingslógini, kann verða ásett, at brot á reglurnar verða revsað við sekt.
*Stk. 3.* Revsiábyrgd kann verða áløgd løgfrøðiligum persónum eftir reglunum í 5. kap. í revsilógini.

*Gildiskoma*

**§ 17.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* Samstundis fara úr gildi reglugerð fyri varðavegir frá 29. oktober 1940 og §§ 41-42 og § 43, 1. og 4. pkt., í Lov nr. 171 af 18. maj 1937 for Færøerne om Hegn og Markfred, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 30 frá 17. mars 1951.

*Broyting í aðrari lóggávu*

**§ 18**. Í løgtingslóg nr. 37 frá 26. mai 1988 um ferðagjald verður í § 3 sett sum stk. 2:

"*Stk. 2*. Ásetingin í nr. 2 er ikki galdandi fyri ferðafólk við cruise-skipum."

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Í 2011 varð farið undir veruliga skipaða marknaðarføring av Føroyum sum ferðamannalandi. Endamálið var at økja ferðafólkatalið soleiðis, at ferðavinnan kundi gerast eitt týðandi ískoyti til samfelagsbúskapin. Henda marknaðarføring eydnaðist væl, og ferðafólkatalið er vaksið nógv seinastu árini. Vaksandi ferðafólkatalið hevur kortini eisini gjørt greitt, at tørvur er á at skipa ferðavinnuna á ein slíkan hátt, at hon í størst møguligan mun er fólki og landi til gagns.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Eingin yvirskipað lóg er um ferðavinnu í Føroyum.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Yvirskipaða endamálið er enn sum áður at gera ferðavinnuna til eitt týðandi íkast til samfelagsbúskapin. Skal hetta málið røkkast, er neyðugt at semjast um og kjølfesta grundhugsanina um, at gestir koma heim til okkara at vitja. Gestirnir koma forvitnir og spentir til okkara land og tjóð, okkara mentan, søgu og samfelag. Gestirnir koma eisini til okkara fjølbroyttu, spennandi og avbjóðandi náttúru, og tað liggur á okkum at verja hesa viðkvomu náttúru.

Meiri umráðandi enn inntøkan av ferðavinnuni er tað tí at tryggja, at náttúran verður vird og vard. Hetta verður gjørt við at skipa soleiðis fyri, at gongd uttangarðs verður løgd til rættis á mest skynsama hátt við gøtum og leiðum, ið ávirka annað virksemi sum minst. Ferðafólk, sum koma til Føroya, skulu rinda eitt náttúrugjald, sum verður brúkt til at fíggja kostnaðin av hesum undirstøðukervi. Íbúgvar landsins rinda skatt og skulu tí ikki rinda náttúrugjaldið. Hetta undirstøðukervið er ókeypis hjá einum og hvørjum at brúka, men farast skal væl um, og skilhaldsreglur skulu gerast.

Uppgávan at tryggja, at ferðafólk veruliga eru kunnug við, hvussu ferðavinnan í Føroyum er skipað, og hvussu ferðafólk skulu bera seg at, liggur í fyrsta liði hjá Visit Faroe Islands, sum hevur yvirskipaðu altjóða marknaðarføringina um hendur. Sama uppgáva er í øðrum liði eisini hjá landinum, hjá kommununum og hjá ferðavinnuni sjálvari, sum øll – hvør á sínum stað og á ymsan hátt – skulu fortelja søguna um Føroyar og hvussu vit tryggja, at ferðavinnan er umhvørvisliga, sosialt og búskaparliga burðardygg.

Stórur dentur eigur at leggjast á at kunna vitjandi ferðafólk um, hvørjar reglur eru galdandi fyri at ferðast í náttúruni og annars um virðing og hóskandi atburð.

Umráðandi er at bera so í bandi, at annað virksemi, t.e. í hesum føri serliga landbúnaður, verður órógvað sum minst, og tí verður skotið upp at gera gøtur og leggja (nýggjar) leiðir soleiðis, at neyðugt fyrilit verður havt fyri hesum, og skilhaldsreglur verða gjørdar. Kommunurnar, sum kenna umstøðurnar á staðnum best, skipa fyri hesum arbeiði í samráð við heimafólkið.

Undir liðini á gøtum og leiðum, sum eru ókeypis hjá einum og hvørjum at brúka, er tað, sum í hesum lógaruppskoti verður nevnt *handilslig ferðavinna*, sbr. serligu viðmerkingarnar til § 2.

*Handilslig ferðavinna* er ein tænasta, sum ein og hvør kann bjóða, og sum viðskiftafólkini rinda fyri. Eins og fyri almennu farleiðirnar skal farast fram við fyriliti fyri bæði fólki á staðnum og øðrum virksemi. Givið er, at talið av ferðafólkum aleina – føroyingum sum útlendingum – kann hava týðandi negativ árin ymsa staðni í landinum, og tí er umráðandi at

leggja so væl til rættis sum gjørligt. Til ber t.d. at avmarka talið av ferðafólkum í hvørjum bólki, at áseta reglur um, hvussu boðað verður frá skipaðum túrum í ávísum økjum, at áseta krav um ferðaleiðara, sum í summum førum skal vera staðkendur, avmarkingar í tíð, bæði á árinum og á samdøgrinum o.a. Í hesum høpi er eisini umráðandi at viðurkenna, at hóast mesta virksemi er uttangarðs, so hevur hetta ávirkan á bygdina. Tað hevur tí týdning at skipa viðurskiftini á staðnum soleiðis, at ferðavinnuvirksemi darvar gerandisdagin sum minst og verður eitt veruligt íkast til bæði verandi og nýggjar staðbundnar vinnur. Umráðandi at fáa í lag gott samstarv millum partarnar á staðnum, bæði jarðareigarar og brúkarar, ferðasmiðir og heimafólkið annars.

Skal ferðavinnan mennast á skynsamasta hátt, er greitt, at tørvur er á støðugt at fylgja við og meta um, hvussu farið verður fram, eins og tað er umráðandi at hava í huga, at ferðavinnan í Føroyum skal spretta úr føroyskum jørðildi. Vit eiga øll okkara part í at trygga, at ferðavinnan hevur undirtøku millum fólkið, her býr, og at ferðavinnan veruliga verður fólki og landi til gagns, samstundis sum vit verja tað, sum ferðafólkini tráa eftir at uppliva – land, fólk, mentan, søgu og náttúru.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Víst verður til pkt. 1.3. Endamálið við uppskotinum.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Atlantic Airways, Bóndafelag Føroya, Ferðaleiðarafelagnum, Ferðavinnufelagnum, Føroya Óðalsfelag, Hagafelagnum, Kommunufelagnum, Smyril Line, TAKS, Vinnuhúsinum og Útoyggjafelagnum umframt hjá stjórnarráðunum.

Harumframt hevur uppskotið verið til ummælis á heimasíðuni hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum í tíðarskeiðinum 25. januar-22. februar 2024.

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Lógaruppskotið hevur í sjálvum sær ikki fíggjarligar avleiðingar fyri landið. Í lógaruppskotinum er kortini ásett, at landið kann yvirtaka lendið, sum vegna ferðavinnu ikki longur kann brúkast til upprunaliga endamálið. Í slíkum førum verður landið at gjalda eigara fult gjald fyri lendið. Er talan um almenna jørð, t.e. festijørð, er talan um gjald fyri mista rakstrarinntøku og ikki um gjald fyri lendið sjálvt. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 10.

Lógaruppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar, sum skulu gera og seta í verk eina ferðavinnuætlan, eins og kommunurnar kunnu fara at fáa útreiðslur til tess at røkka málunum í ferðavinnuætlanini.

Málið er at fíggja sum mest av hesum útreiðslum av náttúrugjaldinum, men í tann mun, hetta ikki røkkur, kann gerast neyðugt hjá kommununum at fíggja restina. Ilt er kortini at meta um, hvussu stórar hesar útreiðslur verða.

Í 2022 vitjaðu umleið 110.000 ferðafólk. Ein varlig meting er, at ferðafólkatalið í 2026 veksur upp í 140.000 – 145.000 ferðafólk. Kostar náttúrukortið 150 kr., verður samlaða

inntøkan uml. 21,5 mió. Av hesum kann væntast, at útreiðslurnar til at gera støðumetingar og at býta peningin verða uml. 1,5 mió.
Inntøkan, ið er eftir at býta, verður tá uml. 20 mió.

Skotið verður upp, at 50% verður býtt til kommunurnar, 25% til bygdirnar og 25% til eigarar og brúkarar av høgunum.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Fyri landið hevur lógaruppskotið nakað av umsitingarligum avleiðingum. Víst verður til pkt. 2.14. Mett verður, at neyðugu umsitingarligu atgerðirnar kunnu fremjast við verandi arbeiðsorku í stjórnarráðnum.

Lógaruppskotið hevur somuleiðis umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar, sum skulu gera ferðavinnuætlan fyri sítt øki. Partur av ferðavinnuætlanini er at gera skilhaldsreglur fyri tey øki, har tað verður mett neyðugt. Kommunurnar eru ymiskar og trupult er tí at nágreina, júst hvussu umfatandi umsitingarligu avleiðingarnar fyri kommunurnar fara at verða.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Fyri ferðavinnuna hevur uppskotið sum heild positivar fíggjarligar avleiðingar.

Fleiri ferðafólk hava við sær øktar inntøkur fyri bæði flutningsfeløg og gistingarhús, eins og fyri tey, sum fáast við at leiga út um netborin sølutorg, eitt nú Airbnb og booking.com. Inntøkurnar vaksa eisini hjá matstovunum og hjá teimum, sum bjóða *Heimablídni*, hjá teimum, sum selja ferðafólkum upplivingar og túrar, hjá teimum, sum selja ferðavinnuni tænastur, og hjá handlum og heimavirkisfeløgum, sum selja tinganest o.tíl.

Fyri landbúnaðarvinnuna kann ferðavinnan harumframt gerast eitt týðandi ískoyti til tær inntøkur, sum annars fáast av landbúnaði. Ein avleiddur vinningur av hesum er harumframt, at vinnuligt virksemi á útoyggj og í útjaðaranum annars við vælskipaðari ferðavinnu úti um landið kann økjast og skapa lív og trivnað.

Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Lendisvíddin í Føroyum er sera avmarkað, og tað er tískil umráðandi, at farið verður varliga og skynsamt um ta vídd, sum er. Tískil eigur at verða skipað fyri, at ymsu sløgini av virksemi, sum eru í náttúruni, bæði vinnuligt og ikki-vinnuligt virksemi, verða løgd soleiðis til rættis, at allir partar fáa røkt sítt virksemi á skynsaman hátt.

Tað primera vinnuliga virksemið í haganum er landbúnaður, og hetta er í útgangsstøði um alt uttangarðslendi. Undir liðini á hesum er annað vinnuligt virksemi, t.d. el- og telefonleiðingar, transformatorstøðir, vindmyllur og goymslur av ymsum slag. Slíkt vinnuligt virksemi hevur ikki stóra ávirkan á landbúnaðin. Aftur at hesum er ferðavinnuvirksemi, sum – vegna talið av ferðafólkum aleina – kann hava munandi størri ávirkan enn annað vinnuligt virksemi. Skulu ymsu sløgini av virksemi kunna virka lið um lið á sama lendi, er umráðandi, at lendisnýtslan verður løgd væl til rættis. Tá ræður um ferðavinnuvirksemi, kann hetta gerast við at leggja gonguleiðir ella gøtur har, sum ferðslan hevur minst ávirkan, bæði á landbúnað og viðbrekin øki, sum krevja serligt fyrilit. Verður rætt atborið, ber til at skipa ymiskt virksemi lið um lið og á slíkan hátt, at náttúran verður ávirkað sum minst.

Lógaruppskotið hevur ávirkan á umhvørvið, bæði tá ið ræður um náttúruvernd, nátturuumsiting, ferðavinnu og landbúnað, og tað veldst um tær ítøkiligu umstøðurnar, um avleiðingarnar samanumtikið kunnu sigast at vera positivar ella negativar.

Leggjast skal afturat, at tað við náttúruverndarlóggávu ber til at avmarka rættindini eftir hesi løgtingslógini fyri at verja náttúruna.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Ferðafólk koma fyrst og fremst til Føroya at uppliva ta serstøku náttúruna kring alt landið. Fyri útjaðaraøki, har tað er trupult at fáa fólk at støðast, er ferðavinnan tí eitt gott høvi at fáa vinnuligt virksemi á staðnum. Samstundis kann ferðavinnan verða eitt gott ískoyti til landbúnaðin á staðnum, við tað at ferðavinna og landbúnaður eyðsæð kunnu fáa gagn hvør av øðrum. Í ferðavinnu starvast vanliga lutfalsliga nógvar kvinnur, og hetta kann vera ein fyrimunur, tá ið ræður um útjaðaramenning.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Eingin viðkomandi millumtjóðasáttmáli er á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Hoyvíkssáttmálin javnsetur fyritøkur, feløg og persónar við heimstaði í Íslandi við fyritøkur, feløg og persónar við heimstaði í Føroyum. Lógaruppskotið broytir ikki hesi viðurskifti.

Lógaruppskotið verður mett at vera í samsvari við *Evropeiska mannarættindasáttmálan,* sbr. *Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention*, og *Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek,* sbr. *Bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap*.

Lógaruppskotið verður harumframt mett at vera í samsvari við *UNESCO-sáttmálan um verju av siðaarvi*, sbr. *Bekendtgørelse nr. 2 af 28. januar 2019 om udvidelse til Færøerne af UNESCO-konvention af 17. oktober 2003 om beskyttelse af den immaterielle kulturarv* og *UNESCO-sáttmálan um vernd av heimsins mentanar- og náttúruarvi*, sbr. *Bekendtgørelse nr. 21 af 5. marts 1980 af konvention af 16. november 1972 om beskyttelse af verdens kultur- og naturarv*.

**2.9. Markaforðingar**
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum. Lógaruppskotið verður ikki mett at elva til markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið staðfestir rættin at ferðast í náttúruni við ávísum avmarkingum og fyrilitum, og til tess at tryggja, at óheimilað inntriv ikki verða gjørd í henda rætt, ber til at áleggja sekt fyri brot á ávísar ásetingar. Í flestu førum er revsing við sekt ein hóskandi revsing. Revsing fyri brot á lógina verður ásett sambært reglunum í 10. kapitli í revsilógini, har tað er tilskilað, at tá ið revsingin skal ásetast, skal havast fyrilit fyri, hvussu álvarsligt brotið er.

Eisini skal fyrilit havast fyri upplýsingum um lógbrótaran, eitt nú persónligum og sosialum viðurskiftum, viðurskiftum hansara fyri og eftir gerðina og orsøkini til, at brotið er framt. Harafturat skal, tá ið revsing verður ásett, fyrilit havast fyri, um brotið er framt við fíggjarligum vinningi í hyggju, uttan mun til um fíggjarligi vinningurin er fingin ella bert var tilætlaður, sbr. revsilógarinnar § 51, stk. 3, og § 80 (bekendtgørelse nr. 215 af 24. juni 1939 om straffeloven).

Lógaruppskotið heimilar, at krøv, sum eru fallin til gjaldingar, t.d. kostnaðurin av at taka burtur ólógligar forðingar, kunnu krevjast inn við panting. Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um fyrisitingarligar sektir, eins og lógaruppskotið ikki ger onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skatt.

Til tess at fíggja kostnaðin av at gera og halda gøtur og farleiðir verður ásett, at øll ferðafólk, 16 ár og eldri, sum koma til Føroya, skulu rinda náttúrugjald. Náttúrugjaldið er 120 kr. Inntøkan av náttúrugjaldinum verður býtt við trimum fjórðingum til kommunurnar og einum fjórðingi til eigarar og brúkarar. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 14.

Afturat hesum er heimild at gera standardavtalu millum øðrumegin fyriskiparar og hinumegin eigara ella brúkara um gjald fyri órógv, sum stendst av skipaðum túrum. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 5.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur hvørki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Landsstýrismaðurin fær heimild at gera av, hvussu allýsingarnar í § 2, nr. 1-5, skulu skiljast, sbr. § 2, stk. 2.

Landsstýrismaðurin skal góðkenna ferðavinnuætlanina, sum kommunur sbrt. § 6 skulu hava gjørt í seinasta lagi 1. juni 2025.

Landsstýrismaðurin kann eftir § 8, stk. 2, áseta nærri reglur fyri, hvussu farast skal fram, tá ið farleiðir verða gjørdar. Her verður serliga hugsað um tilfar og mannagongdir, tá ið gøtur verða gjørdar, so at sami standardur verður brúktur um alt landið.

Landsstýrismaðurin skal góðkenna skilhaldsreglurnar, sum kommunan í samráð við viðkomandi partar kemur ásamt um sbr. § 9, stk. 3. Skilhaldsreglurnar verða lýstar í kunngerð.

Landsstýrismaðurin fær eftir § 11 heimild at áseta reglur um, at tað í økjum, har tað er serliga vandamikið at ferðast, bara skal vera loyvt at ferðast við staðkendum ferðaleiðara, og at serliga vandamikil øki av trygdarávum skulu vera stongd fyri ferðslu ávísa tíð á árinum ella samdøgrinum.

Landsstýrismaðurin skal sambært § 14 áseta nærri reglur um, hvussu inntøkan verður býtt millum ávikavist kommunur og eigarar og brúkarar.

Eftir § 15 kann landsstýrismaðurin áleggja tí, sum hevur ábyrgdina, at fáa aftur í rættlag ella steðga viðurskiftum, sum ikki eru í samsvari við løgtingslógina. Landsstýrismaðurin kann eisini gera av, at tað, ið álagt er, skal fremjast fyri eigarans ella brúkarans rokning.

Kommunum verður álagt at gera ferðavinnuætlan fyri sítt øki, og at henda ætlan skal gerast í samráð við heimafólk og viðkomandi partar, sbr. §§ 6-7. Afturat hesum skal kommunan, í samráð við eigara, brúkara og viðkomandi myndugleikar og stovnar merkja upp farleiðir og gera nýggjar farleiðir, sbr. § 8.

Harumframt skal kommunan gera skilhaldsreglur fyri ávís øki; landsstýrismaðurin skal síðani góðkenna skilhaldsreglurnar og lýsa tær í kunngerð.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Um tann, sum hevur ábyrgd av at fáa í rættlag ella steðga viðurskiftum, sum ikki eru í samsvari við reglur í ella við heimild í lógini, ikki ger eftir boðum, kann neyðuga atgerðin, t.d. at taka burtur ólógliga forðing, gerast fyri eigarans rokning. Í slíkum førum kann verða farið inn á privata ogn uttan rættarúrskurð.

Aðramáta gevur lógaruppskotið ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið verður ikki mett at hava aðrar avleiðingar enn tær, ið eru nevndar omanfyri.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Ja | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Ja | Ja | Ja | Nei | Ja |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1**
§ 1 ásetur yvirskipaða endamálið við løgtingslógini, t.e. at ferðavinna skal vera eitt týðandi íkast til samfelagsbúskapin við at skapa inntøkur, virksemi og trivnað kring landið. Ferðavinnan skal í øllum lutum vera skynsom og burðardygg, og reglur, fyriskipanir o.a., framt eftir hesi løgtingslóg, skulu miða eftir at røkka hesum málum.

Lógargreinin hevur ongan beinleiðis rættarvirknað mótvegis borgaranum, men kann verða ein tulkingartáttur, tá ið aðrar ásetingar í løgtingslógini verða tulkaðar, og vera leiðbeinandi í sambandi við meting.

Víst verður til almennu viðmerkingarnar.

**Til § 2**
Í § 2 verða ávís hugtøk, sum verða brúkt í løgtingslógini, allýst. Allýsingarnar, sum verða brúktar í *hesi* løgtingslógini, víkja í ávísum førum ella í ávísan mun frá teirri vanligu fatanini av hugtøkunum. Hendan øðrvísi allýsing, sum í onkrum førum er væl smalri enn vanliga fatanin av hugtakinum, og sum í øðrum føri víðkar ta gomlu fatanina av hugtakinum kemst av, at hugtøkini hava eina heilt neyva merking í *hesi* løgtingslógini.

Í nr. 1 verður hugtakið *bygdin* lýst. Frá gamlari tíð kann *bygdin* lýsast sum hagi, bøur og strond við rættindum og skyldum, sum eru knýtt at hesum. Í merkingini, sum verður brúkt í hesi løgtingslógini, er *bygdin* loyst frá haga, bøi og strond, og fevnir í staðin um heimafólkið, t.e. fólkið, sum býr á staðnum. Tað er ikki treyt, at heimafólkið eigur ella hevur um hendur jørð; einasta treytin er, at bústaðurin er í bygdini. Er ivi um, hvussu bygdin verður avmarkað, kunnu t.d. staðseting í mun til restina av teirri natúrligt avmarkaðu bygdini ella postnummar brúkast vegleiðandi.

Í nr. 2 verður hugtakið *handilslig ferðavinna* lýst. Hetta hugtakið skal eftir hesi løgtingslógini skiljast sum frammanundan skipaður túrur, har luttakararnir gjalda fyri túrin. Tann, sum skipar fyri tiltakinum, kann verða likamligur ella løgfrøðiligur persónur. Víst verður til viðmerkingarnar til § 5.

Í nr. 3 verður hugtakið *innangarðs* skilmarkað positivt, og í nr. 4 verður hugtakið *uttangarðs* skilmarkað negativt. Hugtøkini eru sínámillum útihýsandi, soleiðis at lendi, sum ikki er at rokna sum innangarðs, verður at rokna sum uttangarðs og øvut.

Í nr. 5 verður hugtakið strond skilmarkað sum rondin, sum myndar markið millum land og sjógv. Breiddin á rondini, har ið loyvt er at ferðast, veldst um tær ítøkiligu umstøðurnar á staðnum, t.d. lendisviðurskifti og brúk.

Nr. 6-7 skilmarka hugtøkini eigari og brúkari. Eigari verður allýstur sum tann, sum eigur óðalsjørð, og brúkari verður allýstur sum festari ella annar, sum uttan at vera eigari hevur jørð um hendi.

Eftir stk. 2 tekur landsstýrismaðurin avgerð, um ósemja í ítøkiligum førum valdar um allýsingarnar í stk. 1.

**Til § 3**

Ásett verður, at einum og hvørjum er frítt at ferðast uttangarðs og fram við strondini við teimum avmarkingum, sum eru ásettar í hesi lóg, í reglum, givnar við heimild í hesi lóg ella í øðrum løgtingslógum og fyriskipanum.

Sjálvur rætturin at ferðast uttangarðs og fram við strondini er ikki treytaður av ávísum endamáli, og tí hevur endamálið við ferðingini ikki týdning, so leingi ferðast verður í samsvari við løgtingslógina.

Orðingin *einum og hvørjum (er) frítt at ferðast uttangarðs og fram við strondini* skal skiljast breitt og fevnir bæði um at staðfesta, verja og fremja rættin at ferðast uttangarðs og fram við strondini. Rætturin at ferðast uttangarðs og fram við strondini er altíð treytaður av, at fyrilit verður havt fyri náttúru, umhvørvi og landbúnaði. Hesi fyrilitini ganga aftur í øðrum ásetingum í løgtingslógini, men ásetingin í § 3 ger greitt, at løgtingslógin ikki hevur til endamáls at viðurkenna nakran rætt at ferðast uttan fyrilit. Rætturin at ferðast í náttúruni skal tí altíð útinnast soleiðis, at náttúra, umhvørvi og landbúnaður uttangarðs og fram við strondini verða órógvað sum minst. Hugtøkini náttúra og umhvørvi skulu í hesum sambandi skiljast breitt og fevna eisini um mentanarminni og mentanarumhvørvi. Víst verður eisini til serligu viðmerkingarnar til § 4 um atburð og § 9 um skilhaldsreglur.

Fyri ferðafólk er rætturin til frítt at ferðast heimilaður í náttúrugjaldinum, sum øll ferðafólk skulu rinda. Við hesum gjaldi, sum er markað til at gjalda fyri at verja náttúru, útbyggja undirstøðukervið, t.e. gera og halda gøtur og farleiðir, og at verja og stuðla mentan og lokalsamfeløgum kring landið. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 14 um býtið av inntøkuni av náttúrugjaldinum.

Rætturin hjá einum og hvørjum til frítt at ferðast forðar ikki fyri skipaðum túrum, soleiðis sum hetta hugtak er skilmarkað í § 2. Víst verður til serligu viðmerkingar til § 2 og § 5.

**Til § 4**
Øll ferðsla í náttúruni skal fara fram við virðing og fyriliti fyri náttúruni, umhvørvinum og øðrum virksemi, sum fer fram í økinum. Fólk skulu ansa eftir, hvussu tey ganga, at tey ikki órógva fugl í bútíðini ella skaða tað, ið grør. Somuleiðis skulu øll virða annað virksemi, sum fer fram í haganum, og ansa eftir, at tey ikki órógva t.d. rakstur ella annað gongufólk. Tá ið farið verður av einum stað, skal staðið vera í sama standi, sum tá ið komið varð á tað. Loyvt er at vassa, svimja og spæla sær í vøtnum og áum, um farið verður hóvliga fram.

Árabátar og smábátar við leysamotori, so smáir at til ber at draga teir upp á strond, kunnu eftir stk. 2 dragast upp í stutt tíðarbil ella leggjast við bátabrúgv ella fyri teym. Eitt dømi kann vera, at fólk, sum eru farin útferð við báti, fara í land eina løtu.

Ásett verður í stk. 3, at tað er bannað at taka gróður, egg, steinar og grót við sær, tá ið ferðast verður uttangarðs.

Stk. 4 setur forboð fyri at hava hund við sær uttangarðs uttan í sambandi við landbúnaðarvirksemi. Eftir galdandi landbúnaðarlóggávu er loyvt at ferðast við hundi eftir varðagøtum, um hundurin verður havdur í bandi, sbr. Lov om Hegn og Markfred § 43. Mett verður ikki, at sami tørvur longur er á at kunna hava hund við sær millum bygdir, og tí setur lógaruppskotið forboð fyri at hava hund við sær í hagan uttan í sambandi við landbúnaðarvirksemi. Hetta so at fenaður og dýr ikki verða órógvað meira enn neyðugt.

Ásetingin í stk. 5 gevur eigara ella brúkara rætt at vísa burtur fólki, sum ber seg fyrilitarleyst at ella er ognini at skaða ella til ampa. Eigarin ella brúkarin má venda sær beinleiðis til einstaklingar. Stendst skaðin ella ampin av fleiri fólkum, ber ikki til at brúka burturvísingarrættin, um tey hvørt í sínum lagi ferðast innan fyri mørkini á gongurættinum eftir løgtingslógini.

Tað er bara eigari ella brúkari, sum hevur rætt at brúka burturvísingarrættin. Hóast skyldan eftir § 4, stk. 1, at hava fyrilit og fara væl um geldur fyri øll, kunnu ferðandi ikki brúka burturvísingarrættin móti øðrum ferðandi.

Burturvísingin kann fara soleiðis fram, at eigarin ella brúkarin munnliga biður tann, sum ber seg ólógliga at, um at fara av staðnum. Burturvísingarrætturin eftir hesi lógargrein gevur ikki eigara ella brúkara heimild at brúka kropsligt vald.

Atburðurin, sum gevur eigara ella brúkara rætt at vísa fólki burtur, skal vera fyrilitarleysur ella vera ognini at skaða ella til ampa. Á hesum skilst, at talan skal vera um munandi óansni, og at bara atburður, sum fer um markið fyri tí, sum eigarin ella brúkarin má góðtaka, gevur rætt at vísa fólki burtur. Burturvísingarrætturin samsvarar við atburðarregluna í § 4, stk. 1, hóast orðalagið ikki er heilt eins. Brot á kravið eftir § 4, stk. 1, um at hava fyrilit og fara væl um gevur tí eigara ella brúkara rætt at vísa fólki burtur eftir hesi lógargreinini. Áseta skilhaldsreglur fyri økið, hvat ið verður mett at vera fyrilitarleyst, kann eigari ella brúkari somuleiðis vísa burtur fólki, sum ikki heldur tær ásettu skilhaldsreglurnar.

Ásetingin er ætlað at virka fyribyrgjandi, og burturvísingarrætturin fevnir undir ongum umstøðum um burturvísing, sum hevði verið ólóglig sjálvtekt eftir § 294 í revsilógini.

**Til § 5**
Ásett verður, at *handilslig ferðavinna*, soleiðis sum hetta hugtakið er skilmarkað í § 2, bara kann útinnast í samráð við eigara ella brúkara. Hetta merkir, at er talan um skipaðan túr, har luttakarar gjalda fyriskipara fyri túrin, skal fyriskiparin hava avtalað hetta við eigaran ella brúkaran. Endamálið við ásetingini er at geva eigara og brúkara høvi til annaðhvørt at boða frá, at tað ikki ber til ávísan dag vegna t.d. fjallgongu ella haruveiðu, at tiltakið má vera fyrr ella seinni á degi, ella at gangast má eina aðra leið.

Kravið um, at slíkt virksemi bara kann útinnast í samráð við eigara ella brúkara, gevur ikki hesum rætt til at nokta fyri slíkum virksemi uttan so, at hetta órógvar annað virksemi, t.d. fjallgongu. Kravið gevur heldur ikki eigara ella brúkara rætt til at geva einum ávísum fyriskipara einkarætt at útinna slíkt virksemi.

Eigari ella brúkari kann kortini altíð krevja, at fyriskiparin hevur gjørt eina standardavtalu frammanundan. Í standardavtaluni, sum landsstýrismaðurin ger, verða treytirnar fyri at útinna *handilsliga ferðavinnu* ásettar, t.d. hvussu tiltakið verður lagt til rættis á skynsamasta hátt, so annað virksemi verður órógvað sum minst.

Avtalan forðar ikki fyri, at eigari ella brúkari veita sama fyriskipara aðrar tænastur fyri gjald. Onnur tænasta er í hesum føri skilmarkað sum ein veiting, sum goldið verður fyri, t.d. ein túrur við ferðaleiðara, ein matpakki, parkering ella atgongd at vesi.

**Til § 6**

Ásett verður, at allar kommunur skulu gera eina ferðavinnuætlan, sum skal fevna um alla kommununa út á kommunumark. Ferðavinnuætlanin skal gerast saman við serstøku ella staðbundnu nevndini, sbr. § 7. Víst verður til viðmerkingarnar til hesa grein.

Í ferðavinnuætlanini skal ferðavinnuvirksemið í kommununi greinast og lýsast, eins og kommunan skal gera eina ætlan fyri, hvussu ferðavinnan í kommununi verður ment og fyriskipað á skynsamasta hátt. Við at eyðmerkja tað serstaka á hvørjari kommunu sær, og við at hava greiða fatan av, hvussu ferðavinna á staðnum best verður ment og útint, ber til at leggja ta staðbundnu ferðavinnuna til ræ ttis soleiðis, at hon í minst møguliga mun órógvar fólk á staðnum, samstundis sum hon kann vera til gagns fyri trivnað og menning á staðnum. Væl fyriskipað ferðavinna kann eisini elva til nýggjar inntøkumøguleikar og fleiri størv, men tá krevst, at kommunan er tilvitað um, hvussu ferðavinnan verður útint best møguligt.

Ferðavinnuætlanin er ikki avmarkað í vavi, tí kommunan – saman við heimafólki – ger av, júst hvussu ferðavinnan best verður ment og útint í júst teirra øki. Ferðavinnuætlanin skal tó í minsta lagi fevna um viðurskiftini, nevnd niðanfyri, ið eru grundleggjandi fyri, um tað yvirhøvur ber til at fara undir at skipa ferðavinnuna á skynsamasta hátt.

Í fyrsta lagi er umráðandi, at almennar farleiðir í kommununi, t.e. farleiðir, har ein og hvør hevur frítt at fara, undir hesum bygdagøtur og aðrar gøtur, og onnur øki, sum eru opin fyri almenninginum, verða lýstar. Somuleiðis skal kommunan meta um, hvørt tað er neyðugt og skynsamt at gera nýggjar gøtur og farleiðir til almenningin. Nýggjar gøtur kunnu, eins væl og bygdagøtur og aðrar gøtur, beina ferðsluna ta leiðina, sum órógvar annað virksemi, t.d. landbúnaðarvirksemi, sum minst.

Umframt at lýsa verandi og komandi leiðir skal ferðaætlanin eisini lýsa, um ávísar leiðir eru soleiðis háttaðar, at tær av trygdarávum ella verndarávum eiga at vera stongdar fyri almennari ferðslu. Í slíkum førum kann verða talan um at steingja ávísar leiðir ella ávís øki part av árinum ella part av samdøgrinum, t.d. á hávetri í ringum líkindum ella í bútíðini hjá fugli. Tá mett verður um, hvørt leið ella øki eigur at verða stongt fyri almennari ferðslu, skal gerast ein torleika- og váðameting. Hetta kann gerast við at litmerkja leiðir, t.d. at marka læ ttar leiðir grønar og truplar leiðir svartar. Givið er eisini, at ávísar leiðir, tó at tær eru almennar, eru so vandamiklar at ganga, at ókunnufólk mugu ikki fara einsamøll. Tá slíkar leiðir umræður, skal kommunan, saman við staðkendum fólkum, meta um, hvørt staðkendur ferðaleiðari er ein treyt fyri at ganga leiðina.

Á ávísum støðum, leiðum og plássum kann harumframt vera viðkomandi at meta um, hvørt tað er neyðugt at avmarka talið av vitjandi, føroyingum eins væl og ferðafólkum. Slíkur stongsil kann vera grundaður á slit, vernd o.tíl., og kann t.d. verða avmarkaður til ávísa tíð á degnum ella árinum. Verður slík skipan sett í verk, skal hóskandi partur av loyvdari atgongd verða markað fólki, búsitandi í Føroyum.

Afturat omanfyrinevndu viðurskiftum skal ferðavinnuætlanin fevna um onnur viðkomandi viðurskifti í kommununi, t.d. hentleikar hjá ferðafólki (vesi, dvalarvikar o.tíl.), neyðug átøk, t.d. møguleikar at sleppa av við burturkast, o.a. Tað er kommunan, sum saman við heimafólki ger av, hvussu best er at skipa ferðavinnuna á staðnum, og tí kann kommunan seta í verk ábøtur og onnur tiltøk, sum verða mett neyðug. Víst verður eisini til viðmerkingarnar til § 9 um skilhaldsreglur.

Ásett verður í stk. 3, at landsstýrismaðurin skal góðkenna ferðavinnuætlanina. Endamálið er at tryggja, at ferðavinnuætlanin hjá einstøku kommununi er í samsvari við yvirskipaða endamálið við løgtingslógini. Ferðavinnuætlanin skal vera liðug í seinasta lagi 1. januar 2025.

Ásett verður at enda, at landsstýrismaðurin í kunngerð ásetur nærri krøv til ferðaleiðarar, sum verða kravdir á ávísum støðum. Krøvini, sum setast kunnu, eru eitt nú krøv um kunnleika til serligu viðurskiftini á staðnum, krøv um útbúgving ella samsvarandi royndir, krøv um trygging o.tíl.

**Til § 7**
Tá ið kommunurnar gera av og leggja til rættis, hvussu ferðavinnan í kommununi verður ment og útint, er umráðandi, at heimafólkið verður tikið við. Tað er heimafólkið, sum fyrst og fremst kennir avleiðingarnar av ferðavinnuni, serliga teirri ferðavinnuni, sum á ymsan hátt kennist innræsin og órógvar fólkið á staðnum, og tí er umráðandi at heimafólkið verður hoyrt í tilgongdini.

Til tess at tryggja, at veruligt fyrilit verður havt fyri heimafólki og fyri møguligum serligum viðurskiftum á staðnum, skal kommunan seta eina serstaka nevnd at vera sær til hjálpar. Í nevndini skulu vera í mesta lagi sjey limir, og hesi skulu geva kommununi ráð um, hvussu best er at leggja ferðavinnuna til rættis. Um tað er viðkomandi – um t.d. bygdin er lítil og fólkini fá – kunnu heimafólkini gera av at fleiri bygdir ganga saman um eina nevnd.

Í staðin fyri at seta serstaka nevnd, nevnd omanfyri, kann kommunan í staðin velja at leggja uppgávuna til ta staðbundnu nevndina, sbr. § 37 í løgtingslóg um kommunustýri.

**Til § 8**
Partur av at tryggja, at rúm er fyri bæði landbúnaðarvirksemi og øðrum virksemi uttangarðs, er at hava møguleika fyri at beina ferðsluna ávísan veg ella ávísa leið. Hugsað verður fyrst og fremst um nýggjar gøtur uttangarðs, sum kunnu leggjast til tey mest vitjaðu støðini, men eisini aðrastaðni, har ferðslan ikki er so nógv, kann verða viðkomandi at leggja nýggjar gøtur. Partur av at menna nýggjar farleiðir er eisini, at tað á henda hátt verður lættari at spjaða ferðsluna um alt landið. Talan kann kortini eisini vera um at leggja nýggjar farleiðir, sum byrja í bygdum øki. Tá er umráðandi at leggja farleiðina soleiðis, at íbúgvarnir verða órógvaðir sum minst, t.d. við at leggja farleiðina burtur frá húsum. Í tann mun tað er viðkomandi, kann eigari ella brúkari fáa endurgjald fyri mist bit.

Farleiðir og gøtur skulu gerast soleiðis, at tær fella væl í lendið. Hetta merkir, at tað er umráðandi at finna eina hóskandi javnvág millum øðrumegin eina góða farleið, ið er løtt at fylgja, og hinumegin eina farleið, ið ikki er alt ov sjónlig í landslagnum. Hetta kann vera ymist, alt eftir trýstinum á farleiðina og lendið, farleiðin skal leggjast ígjøgnum.

Tað eru kommunurnar, sum hava ábyrgdina av at leggja nýggjar farleiðir og gøtur kring landið. Hetta skal kortini gerast í samráð við viðkomandi myndugleikar, eitt nú fornminnamyndugleikar og náttúru- og umhvørvismyndugleikar, eins væl og eigarar og brúkarar, so arbeiðið verður so væl úr hondum greitt sum til ber. Á henda hátt ber til at beina ferðsluna t.d. burtur frá búøkjum hjá fugli og burtur frá støðufrøstum seyðafylgjum, so tey ikki verða skotin av haga. Alt eftir hvussu stórt náttúruinntriv talan er um, kann loyvi krevjast eftir løgtingslóg um náttúrufriðing til at gera gøtur uttangarðs. Kommunan ber allan kostnaðin av at gera nýggjar gøtur.

Landsstýrismaðurin fær eftir stk. 2 heimild til í kunngerð at áseta nærri reglur um, hvussu farleiðir og gøtur skulu gerast, m.a. reglur um tilfar, dygd o.tíl., so tryggjað verður, at ein hóskandi standardur verður brúktur um alt landið.

Tað er umráðandi, at gøturnar eru lættar at fylgja og góðar at ganga, samstundis sum tær falla væl í lendið og ikki broyta eyðkennini við landslagnum meira enn neyðugt. Í hesum sambandi er eisini umráðandi, at gøturnar verða gjørdar úr tilfari, sum hóskar til lendið og landslagið. Hetta kann til dømis gerast við at brúka tilfar úr føroysku náttúruni.

Aftur at nýggjum farleiðum og gøtum eru nógvar gamlar bygdagøtur kring landið. Hesar verða í ávísan mun enn brúktar, tó sjáldan til sítt upprunaliga endamál, sum er at hava eina hóskandi farleið millum tvær bygdir, tí nú er landsvegur allastaðni.

Løgtingið samtykti 29. oktober 1940 reglugerð um viðlíkahald av varðavegum. Sambært hesi reglugerð hevur kommunan ábyrgd av at halda bygdagøturnar, og onkur kommuna hevur eisini brúkt hesa reglugerð sum heimild at halda bygdagøturnar í kommununi. Mett verður ikki, at reglugerðin er farin úr gildi vegna vantandi brúk (desvetudo), og tað eru tí enn sum áður kommunurnar, ið hava ábyrgdina av at halda hesar gøtur.

Tá tað í stk. 3 verður ásett, at kommunurnar hava ábyrgd av at halda bygdagøturnar, er omanfyrinevnda reglugerð frá 1940 ikki viðkomandi longur, og hon verður tí sett úr gildi. Víst verður til viðmerkingarnar til § 16.

**Til § 9**

Sambært ásetingini kann kommunan í samráð við eigara ella brúkara áseta reglur fyri gongdina á støðum, har serliga nógv fólk kemur. Hetta kann m.a. verða gjørt, har vandi er fyri, at náttúran kann vera fyri skaða, ella har trýstið á økið skerjir náttúruupplivingina munandi ella ger tað serliga trupult at reka landbúnaðarvirksemi, um eingi tiltøk verða sett í verk.

Skilhaldsreglurnar kunnu t.d. avmarka talið á fólki í økinum ella avmarka ferðslu ávísa tíð á samdøgrinum umframt at nágreina hóskandi atburð í økinum. Slíkar reglur kunnu t.d. vera grundaðar á, at økið er viðbrekið við atliti at t.d. lendi, djóralívi ella mentanararvi, ella á onnur staðbundin fyrilit.

Ásett verður í stk. 2, at brot á skilhaldsreglur, givnar við heimild í stk. 1, kann verða revsað við sekt.

Eftir stk. 3 skal landsstýrismaðurin góðkenna skilhaldsreglurnar, m.a. fyri at tryggja, at tær ikki skerja rættindini eftir løgtingslógini meira enn neyðugt eftir teimum ítøkiligu umstøðunum. Skilhaldsreglurnar verða lýstar í kunngerð.

**Til § 10**

Ásett verður, at er støðan í einum ávísum øki tann, at tað ikki kann brúkast til tað endamál, sum tað varð brúkt til frammanundan, t.d. landbúnaðarendamál, kann tann, sum eigur ognina, krevja, at landið yvirtekur økið móti fullum gjaldi.

Fyrra treytin fyri, at slík yvirtøka kann fremjast, er, at kommunan frammanundan hevur roynt at skipa ferðsluna við skilhaldsreglum eftir § 9, og at hetta ikki hevur rokkið ætlaða

endamálinum. Seinna treytin er, at økið skal ikki kunna brúkast til tað endamál, tað varð brúkt til frammanundan.

Í allarflestu førum hevur lendið verið brúkt til landbúnaðarvirksemi, og tí viðgera viðmerkingarnar serliga hesa støðu. Tá ið mett verður um virðið á ognini, eru bara landbúnaðarviðurskifti viðkomandi, t.e. virðið á ognini sum landbúnaðarjørð. Hetta merkir, at viðurskifti sum náttúruvakurleiki (herlighedsværdi), ferðavinnumøguleikar o.tíl. ikki eru viðkomandi fyri virðisásetingina.

Til tess at meta um, hvørt treytirnar fyri yvirtøku eru loknar, velur sorinskrivarin tvey metingarfólk við viðkomandi fakligum førleikum, t.d. innan búnaðarfrøði og løgfrøði. Metingarfólkini áseta støddina á gjaldinum, ið landið skal rinda eigaranum. Gjaldið verður ásett á sama hátt sum endurgjald fyri ognartøku.

**Til § 11**
Øll ferðsla í haganum kann vera vandamikil, og tí verður altíð ferðast undir egnari ábyrgd. Onkustaðni kann tó vera serliga hættisligt at fara, um ein ikki er staðkendur. Í slíkum førum kann landsstýrismaðurin í kunngerð áseta reglur um, at øll, sum ferðast í økinum, skulu hava onkran staðkendan við sær. Við staðkendum verður hugsað um fólk, sum kenna umstøðurnar á staðnum og eru von at ganga har.

Somuleiðis kann tað summastaðni vera vandamikið at ferðast í t.d. myrkri ella hálku, og í slíkum førum kann landsstýrismaðurin eftir stk. 2 steingja økið ávísar tíðir á samdøgrinum ella árinum.

**Til § 12**
Eftir stk. 1 er ikki loyvt eigara ella brúkara við gjaldportri o.tíl., við stongsli ella á annan hátt at forða fyri lógligari atgongd ella gera tað trupult hjá fólki at útinna sín rætt eftir løgtingslógini. Hugtakið gjaldportur í hesum høpi fevnir ikki bara um sjálvvirkandi skipanir, men eisini um t.d. postkassar og skelti við boðum um at leggja pening ella flyta pening á kontu. Við stongsli meinast fysisk forðing, girðing, múrur, læst portur ella bygningsverk ella onnur konstruktión, sum ikki slepst framvið.

Um okkurt er at rokna sum ein ólóglig forðing, veldst um endamálið. Til dømis er eitt stik lógligt, um endamálið er at halda seyði innan fyri mark, men ólógligt, um endamálið bara er at gera tað trupult hjá fólki at ganga. Metingin veldst um, um stongsilin tænir einum grundaðum áhugamáli.

Á orðingini *ella á annan hátt* skilst, at ásetingin ikki bara fevnir um fysiskar forðingar, men eisini annað, sum kann forða fyri lógligum ferðslurætti. Talan kann vera um sálarfrøðiligar forðingar, t.e. forðingar, sum uttan at vera fysiskar, kunnu fáa fólk at aftra seg við at útinna síni rættindi eftir løgtingslógini, t.d. skelti við teksti sum *Privat ogn, Hundurin er leysur, Tarvurin er leysur* ella *Ferðsla við egnari ábyrgd.* Eins og tá ið talan er um fysiskar forðingar, veldst tað um endamálið, um slík skelti eru at rokna sum ólógligar forðingar.

Forboðið fyri stongslum uttangarðs ber ikki í sær eitt alment galdandi forboð fyri, at ein eigari ella brúkari við sínum eigararæði kann brúka ella røkta ognina hjá sær og eisini brúka hana á annan hátt innan fyri lógligar karmar. Tað eru forðingar, sum hava til endamáls at sjikanera tey ferðandi, sum verða ólógligar, t.e. gerðir, sum ikki hava annað endamál enn at forða fyri annars lógligari ferðslu á ognini.

Stk. 2 hongur saman við ásetingini í stk. 1, men snýr seg burturav um at kunngera forboð fyri lógligari ferðslu og uppihaldi við skelti ella á annan hátt. Í slíkum førum kann talan sigast at vera um sálarfrøðiligan stongsil. Eitt dømi um ein slíkan stongsil kundi verið eitt skelti við áskriftini *Privat jørð, atgongd bannað* ella eitt skelti við eini mynd av einum gongufólki við einum krossi útyvir.

Í stk. 3, 1. pkt., verður ásett, at ein eigari ella brúkari hóast stk. 1-2 kann avmarka ferðslu og uppihald, sum órógvar serligt landbúnaðar- ella veiðuvirksemi, t.d. fjallgongu og haruveiðu, og við skeltum ella á annan hátt kunngera slíka avmarking. Ásetingin fevnir bara um serligt afturvendandi virksemi í haganum.

Eftir stk. 3, 2. pkt., skulu avmarkingar eftir stk. 3, 1. pkt., vera so avmarkaðar sum gjørligt. Í tí liggur, at avmarkingarnar skulu vera proportionellar, bæði við atliti at økisvídd og tíð, og at rætturin hjá fólki eftir lógaruppskotinum skal verða skerdur sum minst.

Í stk. 4 verður heimilað landsstýrismanninum í kunngerð at áseta nærri reglur um, hvussu slíkar avmarkingar skulu kunngerast alment. Almannakunngeringin skal gerast soleiðis, at fólk hava ein veruligan møguleika fyri at kanna, um ávíst øki er stongt, og talan verður tí um eina tøkniliga skipan, t.d. kunngering á eini heimasíðu ella á eini app. Afturat hesum ber eisini til at kunngera stongsilin við einum skelti á portrinum o.tíl.

Eftir § 15 kann landsstýrismaðurin áleggja eigara ella brúkara at taka burtur stongsil, skelti ella fráboðan, sum er brot á § 12, stk. 1-2, sbr. viðmerkingarnar til § 15.

**Til § 13**
Ásett verður, at øll ferðafólk, 16 ár og eldri, sum koma til Føroya, skulu rinda eitt náttúrugjald. Gjaldið verður ásett í kunngerð og verður kravt inn saman við ferðagjaldinum eftir løgtingslóg um ferðagjald.

Gjaldið verður eisini kravt frá ferðafólkum við cruise-ferðaskipum, sum einans steðga stutt í Føroyum. Víst verður til viðmerkingarnar til § 18.

**Til § 14**
Í § 14 verður ásett, hvussu inntøkan av náttúrugjaldinum verður býtt millum ávikavist kommunur, bygdir og eigarar og brúkarar.

Inntøkan, sum kommunan fær av náttúrugjaldinum, er markað til at gera og halda viðlíka gøtur í haganum, undir hesum eisini bygdagøtur, umframt til onnur átøk, sum skipa ferðavinnuna. Partur kann eisini brúkast til t.d. bjargingarlið ella sløkkilið á staðnum.

Kommunan skal ansa eftir, at hóskandi partur av inntøkuni verður brúktur í teimum bygdum, sum eru undir mesta trýsti av ferðavinnuni. Sum meginregla skal hesin partur brúkast at skipa ferðavinnuna á staðnum, men kommunan kann eisini i samráð við ta serstøku nevndina gera av, at peningurin skal brúkast til onnur endamál, sum kunnu linna trýst og órógv, sum ferðavinnan hevur við sær.

Partur bygda av náttúrugjaldinum verður latin serstøku nevndini eftir § 7, stk. 1, at umsita til átøk og trivnað á staðnum. Peningurin verður í fyrstu atløgu goldin kommununi, sum síðani

letur bygdini ella bygdunum sín lutfalsliga part. Hetta kann gerast við at seta pening á kontu, markað til ávísu bygdina og gjalda út so hvørt, peningur verður brúktur.

Tann parturin av inntøkuni, sum verður latin eigarum og brúkarum, t.e. høgum, verður latin uttan treytir. Peningurin verður eina ferð um árið goldin annaðhvørt hagastýrinum ella festaranum beinleiðis. Í seinna førinum skal peningurin sostatt ikki rindast á festikontu.

At enda verður landsstýrismanninum heimilað í kunngerð at áseta nærri reglur um, hvussu inntøkan innanhýsis verður býtt millum ávikavist kommunur, bygdir og eigarar og brúkarar. Inntøkan verður býtt sundur soleiðis, at bæði kommunur og eigarar og brúkarar, fáa eitt grundgjald, sum er tað sama í bólkinum. Restin av inntøkuni verður býtt eftir einum lykli, sum tekur støði í tí trýsti, sum ávísa økinum er fyri. Trýstið kann verða mált við at skráseta talið av telefonum á staðnum, og á tann hátt fáast ábendingar um, hvussu trýstið er ymsastaðni í landinum. Talan er um navnleysa skráseting, og tað merkir, at tað ber ikki til at eyðmerkja persónar ella nationalitet. Tað hevur í hesum sambandi ikki týdning, um partur av teimum, sum ferðast í økinum, eru føroyingar ella fólk, búsitandi í Føroyum; tað avgerandi er samlaða talið og harvið eisini samlaða trýstið.

**Til § 15**
Ásett verður, at landsstýrismaðurin við hóskandi freist kann geva boð um, at ávís viðurskifti, sum ikki eru í samsvari við løgtingslógina, skulu fáast í rættlag.

Tá tað í lógini verður ásett, at ávís støð kunnu øll ferðast til gongu, um farið verður fram við fyriliti og hóskandi varsemi, er umráðandi, at ólógligar forðingar ikki verða settar fyri hesum. Forðingar í hesum høpi kunnu vera portur, bummar o.a., men eisini gjaldsportur og gjaldsstøðir, ið eru ein forðing í lógarinnar høpi, sbr. ásetingina í § 3.
Til tess at tryggja, at slík viðurskifti verða fingin í rættlag beinanvegin, fær landsstýrismaðurin heimild at geva boð hesum viðvíkjandi. Eitt nú kann nevnast, at verður farið undir bygning, inngirðing ella annað, sum er ímóti forboði ella boðum eftir løgtingslógini, kann landsstýrismaðurin geva boð um, at arbeiðið skal halda uppat.

Somuleiðis kann landsstýrismaðurin geva boð um, at heilt ella fyri ein part reistir bygningar, stongslar ella aðrar innrættingar, skeltir ella fráboðanir, sum eru ímóti forboði ella boðum eftir løgtingslógini ella reglum, givnar við heimild í lógini, verða tikin burtur. Tann, sum hevur ábyrgdina av ólógligu forðingini, ber kostnaðin av at taka hana burtur.

Vil tann, sum hevur ábyrgdina, ikki taka ta ólógligu forðingina burtur, kann hetta verða gjørt fyri ábyrgdarans rokning. Hetta krav kann krevjast inn við panting.

**Til § 16**
Brot § 4, stk. 1, um fyrilitarleysan atburð, § 4, stk. 3, um at taka við sær gróður, egg, steinar og grót, § 4, stk. 4, um forboð fyri at hava hund við sær uttangarðs, § 5, stk. 1, og § 12, stk. 1-2, um forboð fyri at forða fyri lógligari atgongd o.týl. verða revsað við sekt. Brot á boð, sum verða givin eftir § 15, stk. 1, verða somuleiðis revsað við sekt.

Revsiábyrgd kann verða áløgd løgfrøðiligum persónum eftir reglunum í 5. kapitli í revsilógini.

Í stk. 2 er ásett, at í reglum, ásettum við heimild í løgtingslógini, kann verða ásett, at brot á reglurnar verða revsað við sekt.

**Til § 17**
Løgtingslógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fara úr gildi reglugerð fyri varðavegir frá 29. oktober 1940 og §§ 41-42 og § 43, 1. pkt., í Lov nr. 171 af 18. maj 1937 for Færøerne om Hegn og Markfred, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 30 frá 17. mars 1951.

Løgtingið samtykti 29. oktober 1940 reglugerð um viðlíkahald av varðavegum. Ivi hevur verið um, hvørt henda reglugerð framvegis hevur gildi, m.a. tí at varðagøturnar hava mist sín upprunaliga týdning, tá ið vegir vórðu gjørdir millum bygdirnar. Reglugerðin er kortini ongantíð formliga sett úr gildi og má tí metast framvegis at vera í gildi. Í hesi løgtingslógini verður ásett, at kommunurnar hava ábyrgd av at halda varðagøturnar, og reglugerðin frá 1940 er tískil ikki viðkomandi longur. Reglugerðin verður tí sett úr gildi.

Í § 41 í Lov for Færøerne om Hegn og Markfred frá 1937 er ásett, at ongum er loyvt at ganga uttan fyri beina bygdagøtu í haga, har hann ikki er eigari. Henda avmarking í gongurættinum, sum er grundað á landbúnaðarfyrilit, er ikki í samsvari við reglurnar í hesi løgtingslógini og verður tí strikað. Víst verður til § 3 og viðmerkingarnar til ta greinina.

Í § 42 eru nevnd tey føri, har loyvt er hjá fólki at ganga í fremmandum haga í ávísum ørindum. Talan er í øllum førum um ørindi, sum eru knýtt at landbúnaðinum. Heldur ikki hesar avmarkingar í gongurættinum eru í samsvari við reglurnar í hesi løgtingslógini, og tí verða tær strikaðar.

Í § 43, 1. pkt., er ásett, at loyvt er bara at ganga við hundi í fremmandum haga, um gingið verður eftir beinari bygdargøtu, og tá bara, um hundurin er í bandi. Henda áseting verður sett úr gildi, tí tað í § 4, stk. 5, í løgtingslógini verður ásett, at loyvt er ikki at hava hund við sær uttangarðs, uttan so at hetta er í sambandi við landbúnaðarvirksemi. Víst verður til § 4 og viðmerkingarnar til ta greinina.

**Til § 18**
Til tess at tryggja, at eisini ferðafólk við cruise-skipum rinda ferðagjald og náttúrugjald, verður løgtingslóg nr. 37 frá 26. mai 1988 um ferðagjald broytt soleiðis, at undantakið fyri hesi ferðafólk verður strikað.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, dagfesting.

**Høgni Hoydal**
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Hoyringarsvar frá...
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá...

Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá...